Á Borg á Argjum á pátriksmessu 2007

**AB er suðurstreymoyarmeistari!**

## Til lukku við bragdinum, AB!

EYÐUN Á BORG



Tað var rættiligur landskronafagnaður í Gundadali leygardagin 17. mars, pátriksmessudag. Pátrikur var ápostul Írlands. Argjanavnið er kanska eisini av írskum uppruna, so har er møguliga okkurt samsvar!?

AB (mansliðið) vann 1-3 á útivølli móti sjálvum steypsvinnarunum, B36, sum júst hevði vunnið á føroyameistarunum í dystinum um vælgerðarsteypið. Sostatt má AB nú vera suðurstreymoyarmeistari, minst!?

AB-áskoðararnir vóru framúrskarandi í bygdaskýlinum hendan dagin! Nú spyr onkur kanska, hvussu leingi Jeppe var í barónsins song? Jú, gaman í; men í løtuni eru vit har. Latið okkum njóta tað, so leingi, tað varir, Argir!

Spell, at eldsálin og undangongumaðurin, Tórálvur Stenberg, ikki slapp at uppliva hesa fagnaðarløtuna! Hann slapp so at uppliva uppflytingina í fjør. Sannast má, at "harmur og gleði í felag tey reika".

Annars eru fleiri argjafólk í samleikakreppu, nú AB er komið upp í ovastu deild í mansfótbólti. Nøkur av okkum hava jú hildið við B36 í fimmti ár, so tað var ein løgin kensla hendan dagin. Støðan hjá mær er tó greið; í hesum førinum má eg halda við bygdarliði mínum á Argjum og ikki við stórbýarliðnum. Eg skal nokk halda við B36, tá AB ikki er mótstøðuliðið.

E. S. Magni, tú tippaði 3-1. Røtt tøl, men----! Útvarpsviðmerkjarin hjá B36 gjørdi meg eitt sindur vónbrotnan. Hann hevði ikki akkurát rósandi orð á munni um lítla beiggja á Argjum. B36-venjarin var tó nógv meiri ítróttaligur. Jákup, AB hevur kanska brúk fyri tær!? Røturnar og navnið eru jú av Argjum.

Við fótbóltskvøðu

# Havnin – nú brýtur í bæði borð

HEÐIN MORTENSEN
Borgarstjóri



Vit havnarfólk fáa illa hugt í bløðini ella latið upp fyri útvarpinum ella sjónvarpinum uttan at renna okkum í tíðindi um, at nú skal hesin ella hasin stovnur flytast úr Havn, og at starvsfólkini bara kunnu fylgja við, ella at nú skal skattur flytast/javnast úr Havn.

At visjónin hjá okkara løgtingslimum ikki røkkur til at skapa nýggj arbeiðspláss her á landi, talar fyri seg um breyðpolitikkarar, men hesum fáa vit kanska skikk á, tá val verður í næstum, og vit vilja flyta Føroyar inn í framtíðina.

Hinvegin er ovboðið, at sjálvur formaðurin í FKF leggur meg og KSF undir at arbeiða í loyndum við lýsing av javningarskipan, nú KSF aftur varpar ljós á inntøku- og útreiðslujavning. Kann vera, at Rósa Samuelsen hevur gloymt umrøðuna av javningarmálinum fyri tíð síðan, tá KSF lýsti málið fyri m. ø. løgtingsmonnum, løgtingskvinnum og umboðum fyri landsstýrið. Fjølmiðlarnir umrøddu eisini málið - so mín góði kollegi Rósa Samuelsen; hvørki eg ella KSF stinga nakað undir teppið, verð tú vís um tað. Sjálvandi veit eg ikki, hvat tit arbeiða við innanhýsis, men tað, ið tit boða frá í flølmiðlunum, ber ikki boð um visjónsarbeiði.

At tit í FKF blaka um tykkum við hálvlýstum pástandum, eigur ikki at varpa ringt ljós á okkara heildarlýsing av einari javningarskipan, ið lítil nytta er í.

Eg eri ikki ósamdur við tykkum um, at "vit fáa ikki eina ríka kommunu við at leggja fleiri fátækar sama" – hetta er ein slitin pástandur. Men Sunda kommuna er besta prógv fyri, at vit sanniliga fáa eina sterkari kommunu við at leggja saman. Ikki tær at siga, Rósa Samuelsen, so er betur við einari sterkari kommunu, enn fleiri fátækum – hetta kunnu fólk í Sunda kommunu siga tær.

# Kendur blaðstjóri sett fræls frá homosexuellum lívsstíli

JENIS AV RANA



Charlene Cothran hevur seinastu 13 árini verið blaðstjóri á blaðnum Venus Magazine, eitt blað ætlað svørtum homosexuellum amerikanarum. Í farnu viku vitnaði hon um frelsu sína og tók frástøðu frá tí livihátti, hon hevur livað og virkað fyri alt tilkomna lív sítt.

*– Seinastu 23 árini havi eg ágangandi og eggjandi stuðlað søk teirra homosexuellu og lesbisku, sigur hon sambært tíðindastovuni "One news".*

*– Eg havi lagt til rættis og verið við í ótaldum kravgongum og eg havi verið talskvinna í stríðnum fyri javnstøðu fyri homosexuell og lesbisk.*

Víðari greiðir hon frá, at hon hesi árini eisini hevur givið stóran fíggjarligan stuðul til stríð teirra homosexuellu. Men eftir at hon gjørdist kristin, er lívið fullkomuliga broytt.

Greinin ber heitið: "tíggju hættir at koma úr homosexuella lívsstílinum, um tú ynskir tað."

Sum blaðútgevari er hon komin á tal við menniskju í túsundatali. - *Eg havi ávirkað túsundir at koma "út út skápinum" at standa fram sum homosexuell og lesbisk. Men nú eri eg sjálv komin út úr skápinum - einaferð enn,* greiðir hon frá.

Fyri stuttum upplivdi hon umbroytandi megi Guds koma yvir seg. Tað hendi, tá hon gav seg yvir til Jesus Kristus. Heilagi Andin talaði beinleiðis við hana og gjørdi greitt, at hon hendan ávísa dagin mátti velja hvørjum hon vildi tæna.

*– Hann gjørdi mær greitt, at valdi eg skeivt, so fór Guð at loyva mær at dríva so langt frá sær, at eg ongantíð aftur fór at kunna hoyra rødd hansara.*

*Har í bili mínum, á einum stórum parkeringsøki, gav eg Gudi hjarta mítt og sál mína, meðan tárini runnu niður eftir andlitinum. Og har upplivdi eg fyrigeving Hansara.*

Charlene Cothran ætlar at halda á at arbeiða í sama umhvørvinum, men á ein heilt annan hátt.

*– Eg verði eins beinleiðis í vitnisburði mínum sum trúgvandi, sum eg var í farna lívi mínum.*

Málbólkurin verður hin sami, men nú verður endamálið at eggja, útbúgva og hjálpa teimum, sum eru fangaði í homosexuella og lesbiska umhvørvinum, men sum ynskja at gerast fræls.

# Nakað um desentralisering og um flyting av stovnum

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður



**Viðgerðin í høvuðsstaðarfjølmiðlunum er grunn og subjektivið tørvandi kritiskum spurningum og tí vánaligum afturljóði**

Nakrir dagar eru nú farnir síðani fram kom í fjølmiðlunum, at 13 landspolitikarar í brævi til løgmann samgonguleiðara bóðu um at fáa sett skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk við tveimum politikarum úr hvørjum samgonguflokki og at skrivari verður settur, fyri at koma við uppskoti um "hvørjir stovnar møguleiki er at leggja út um landið".

Lat meg gera greitt, sum átti at komi fram í sendingini 62 norður í útvaprinum, at allir tinglimir í samgonguni fingu tilboð at undirskriva brævið, men bara landspolitikararnir nýttu høvið, meðan lokalpolitikarar í høvuðsstaðnum ikki ynsktu.

Oddagreinin í Dimmalætting 13. mars viðgjørdi málið, sum vanligt tá talan er um annað enn høvuðsstaðin, subjektivt, og kallaði átakið "jánkasligt valagn", meðan Sosialurin viðgjørdi tað, sum teir oftast gera, eitt sindur breiðari, men gjørdu vart við, at um ikki allir almennir stovnar lógu í høvuðsstaðnum, varð vónleyst at kappast við Reykjavík, London, Geneve og Keypmannahavn.

Síðani komu báðir travararnir og lokalpolitikararnir, nú- og fyrrverandi borgarstjórarnir Heðin Mortensen og Poul Michelsen, og seinast sending útvarpsins 62 Norður, har okkara serstaki hagtalsfrøðingur segði nakað.

**Sterkari og førleikaførari øki**
Heldur enn at fara í endaleysa trætan við hesi, kundi eg hugsað mær at farið víðari.

Fyri tað fyrsta er ikki í einum fremkomnum landi í longdini gongd leið hálvavegna at gera statskvett, tá ein stovnur skal flytast, hóast hetta higartil hevur verið einasta gongda leið, tá hann skal flytast úr høvuðsstaðnum, tí sovorið skal gerast við skili.

Í øðrum lagi er neyðugt við sterkari og meiri savnaðum økjum úti um landið og meiri førleikagevandi kommunum. Fáa vit ikki samfeld samfeløg við vinnu, mentan, sosialum og útbúgvingarligum greinum, doyggja økini, tí fólk við útbúgvingum fer har arbeiði er, har frítíðarvirksemi, barnaansing, grundøki og har eitt livandi samfelag er.

**Ússaligt úrvarpsorðaskifti**
Í sendingini 62 norður seinasta fríggjadag royndi Herman Oskarsson at staðfesta við einum eiði, at ikki bar til at politikarar sótu í eini tílíkari nevnd, sum er mjarrað upp í saman í útvarpinum, tí her skuldi ein gransking fara fram. Tá hendir ikki meira enn tað, sum er hent, uttan at vit fáa áralangt kostnaðarmikið arbeiði til onga nyttu.

Tá eg hoyrdi hesi bæði – fjølmiðlafólkið og hagtalsfrøðingin – kom eg at hugsa um ein, sum hevði verið á skeiði. Tá hann kom aftur, varð hann spurdur, hvat hann hevði fingið burtur úr.

"Jú," segði hann, "eg eri líka óvitandi sum áðrenn, men nú liggur tað bara á hægri støði". Her var eingin kritiskur spurningur og sjálvandi tí ótrúliga vánaligt afturljóð.

# I AM!

In a crowed I walk in to freedom
Freedom from own limitations
Freedom from suppressing my own soul
Freedom from my worst enemy: me
I am setting ME free from me
Listening to the voice within
the voice of GOD
"And the truth shall set you free"
I am beautiful!
I am powerful!
I am many different things.
But most important of all:
I AM!

**Súsanna Vígdá 2005**

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum

